# Skúlastýrisfundur

## 2021-2024/07 - 17. februar 2022 16:00-18:00

### Skrá:

1. Foreldraumboðsfundurin
2. Felags foreldrafundur: Nær, Hvat og Hvør?
   Møgulig evnir:
   a. Hvussu skipa skúlaumhvørvið til bæði útsnúin og innsnúin?
   b. Happing (Rógvi Dam).
   c. Er munur á innlæring við skermum og bókum?
3. Køkurin: "Øll" foreldraumboðini halda, at vit mugu koma í gongd nú!!!
4. Krossvegurin við Á-handilin á Landavegnum: Foreldur meta hann vandamiklan fyri skúlabørn.
5. Skúlaumhvørvið: Ber til at skapa fleiri minni "rúm" í gongini?
6. Ymiskt
7. Áseta næsta fund

### Møtt á fundi:

| | |
|---|---|
| Møtt: | Regin, Ruth, Bjørg, Sjúrður, Derhard & Snorri |
| Forfall: | Erla |
| Gestir: | Eingin |

### Fundarfrágreiðing

Ad.1
**Foreldraumboðsfundurin**
Knapliga 60 foreldur møtu á fundi. Fundurin var góður og tey kendu, at tey við fundunum fingu gott samband við foreldraumboðini í skúlastýrinum. Tað er tekin um nærdemokrati, ið riggar.
Foreldraumboðsfundurin fekk eina gjøgnumgongd av hjartamálunum hjá stýrislimunum.
Serliga kantina, trivnaður og børn, sum kunnu detta niðurímillum í skipanini vóru umrødd.
Foreldraumboðsfundurin kom við uppskotum um evni til felags foreldrafund, sum skúlastýrið skipari fyri á vári. Innvend og útvend børn og skúlaumhvørvið, skíggjar og innlæring umframt happing vóru høvuðsevnini, ið vóru tikin fram.

Ad.2
**Felags foreldrafundur**
Semja um at vit arbeiða víðari við evninum Innvend og Útvend børn í mun til læring og skúlaskap.
Uppskot um fyrilestrarhaldarar eru Inga Katrin Winther, arkitektur, ið hevur sniðgivið skúlagarðin og lutvíst eisini inniumhvørvið, Regin kannar hetta. Ein ergoterapeutur er í uppskoti. Bjørg Dam kannar hetta. Eitt umboð fyri Námsvísindadeildina er í uppskoti, Sjúrður kannar hetta. Eitt uppskot innan sálarfrøðina er í uppskoti Derhard kannar hetta.
Antin 3x15min ella 2x25 min

Hósdagin 31 mars. 19:00-20:30

Ad.3
**Køkurin**
Foreldraumboðini á foreldraumboðsfundinum ynsktu punktið á skrá.
Umboðsráðið ynskir, at kantinan verður opin skjótast gjørligt og at kantinan bjóðar heilsugóðan kost.
Skúlastýrið heitir á leiðsluna um at kanna møguleikan at fáa ein veitara inn kostnevtralt fyri skúlan, ið veitir heilsugóðan kost við støði í kostráðunum og venda aftur til skúlastýrið við einum uppskoti til støðutakan.
Ein møgulig verkætlan innan kost og rørslu er eisini vælkomin, um ein slík skuldi komið.

Ad.4
**Krossvegurin við Á-handilin**
Foreldur eru stúrin um krossvegin við Á. Møguliga manglar ein gonguteigur við bussteðgistaðið og skipanin við minus-grønt er ikki til at finna út av, tí eru børnini ikki nóg trygg í ferðsluni.
Foreldraumboðsfundurin heitir á skúlastýrið um at taka málið upp við kommununa. Skúlastýrið heitir á leiðsluna um at fáa ástaðarfund við umboð fyri teknisku deild, leiðsluna og skúlastýrisformannin.

Ad.5
**Skúlaumhvørvið**
Ber til at skapa fleiri minni "rúm" í gongini? Punktið bíðar til eftir felags foreldrafundin.

Ad.6
**Ymiskt**
Kunning um skúlabygnað
Foreldraráð til Gulaskúla

Ad.7
**Áseta næsta fund**
Uppskot

Hósdagin 31/3 2022, 17:30-18:30